# Sørvingar skulu royna at koppa ÍF

**Higar til einaráðandi fuglfirðingarnir fáa torføra uppgávu í Sørvági um vikuskiftið, og í Havn verður grannauppgerð millum Fram og Fleyr**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Enn hevur ÍF ikki tapt nakran dyst hetta kappingarárið, og eru teir tí sjálvsagt eisini liðið, sum er ovast á stigatalvuni. Ikki so mikið sum eitt einstakt sett er farið av kontini higartil, og tí er spurningurin helst, um nakar er førur fyri at gera nakað sum helst við oddaliðið.

Tað er tó einki at ivast í, at Sørvingar fara at gera eina roynd, tá teir fáa vitjan sunnudagin. SÍ er kanska eisini eitt av teimum liðum, sum veruliga kann gera nakað við ÍF, um lagið er hitt rætta. Í Borgo og Raika hava sørvingarnir tveir av sterkastu álopsmonnunum í landinum, og tað er so avgjørt neyðugt, at hesir vísa síni kynstur, tá ÍF vitjar, eins og tað eisini er neyðugt, at hinir leikararnir á liðnum spæla upp til sítt allar-, allarbesta.

Í Havn verður grannauppgerð á skránni, tá Fram og Fleyr skulu takast, men í mun til so nógvar aðrar grannauppgerðir, sum hava verið, so er tað helst so sum so við spenninginum hesaferð. Æran er sjálvandi altíð upp á spæl, tá slíkar uppgerðir standa fyri framman, men tað er greitt, at Fram er stórfavorittur at vinna dystin, nú Fleyr í ár tykist hugsa meira um týdningin av at spæla eitt framtíðar lið saman, heldur enn at satsa ov nógv upp júst árið í ár.

# Toppdystur í Trongisvági

**Føroyameistararnir úr TB taka leygardagin ímóti mest vinnandi kvinnunum í føroyskum flogbólti, tá Mjølnir vitjar**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir fleiri greiðar favorittuppgerðir er spenningurin í hæddini í kvinnuflogbóltinum hetta vikuskiftið.

Leygardagin verður nevnliga oddadystur í høllini í Trongisvági, tá føroyameistararnir úr TB taka ímóti Mjølni.

Og tað er nógv, sum bendir á, at tað er TB, sum er favorittur undan dystinum. Ikki bert, tí tær vunnu tryggan sigur í umvendu uppgerðini í Klaksvík, men eina mest tí meistararnir veruliga hava leikt sum meistarar í seinastuni. Eftir tapið í fyrsta dystinum ímóti ÍF, hevur formkurvan bara gingið ein veg, og megna tær at halda fast um góðu gongdina, so er meira enn væl hugsandi, at klaksvíkingarnir verða settar upp á pláss.

Hinvegin er einki at ivast í, at TB veruliga skal spæla upp til sítt besta, tá Mjølnir er mótstøðuliðið. Tað er ikki av ongum, at liðið er hitt mest vinnandi í føroyskum kvinnuflogbólti, og og aftur í ár hava tær ein sera sterkan hóp. Bert ta einu ferðina – júst ímóti TB – eru tær farnar av vøllinum sum taparar, og á sama hátt sum TB, so kann Mjølnir við einum sigri skapa sær kanska avgerandi hol niður til argastu mótstøðuliðini.

## ÍF skal fylgja við

Tað eru tó ikki bert TB og Mjølnir, sum eru oddalið í ár. ÍF hevur eisini verið væl við. Tær eru tær einastu, sum hava knógvað TB, og tað er bert ímóti Mjølni, at tær eru farnar av vøllinum sum taparar.

Sunnudagin skulu tær royna seg á Giljanesi, og tó at Dráttur hevur eitt hampuliga sterkt lið, so eigur ÍF tó at metast sum favorittur undan hesi uppgerðini. Og í øllum er einki sum eigur fyri teirra viðkomandi. Kravið er ein sigur, um liðið framhaldandi skal hanga fast í oddinum, áðrenn tær komandi vikurnar skulu royna seg móti hinum báðum oddaliðunum.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður í Hoyvík sunnudagin, tá KÍF og Fleyr hittast. Hetta er talan um dyst millum tey bæði niðastu liðini, og tó at Fleyr vann greitt í fyrra dystinum teirra millum, so er ikki óhugsandi, at KÍF kann gera onkran vørr. Seinastu dystirnar hava avgjørdir glottar verið at sæð, og um liðið megnar at halda fast í hesum, so eiga fyrstu stigini í meistaradeildini ikki at vera so øgiliga langt burturi.



*Toppdystur verður í Trongisvági um vikuskiftið, tá Mjølnir kemur á vitjan hjá føroyameistarunum í kvinnuflogbólti*


veitst tú ikki tað?









## Kunningarleiðari

Ferðavinnan í Vágum og Vága Vinnufelag hava lagt saman og fara í næstum at lata upp nyggja Kunningarstovu í Vágum.

Vit søkja tí eftir einum dagligum leiðara at byrja 1. januar 2003.

**Arbeiðsuppgávurnar á Kunningarstovuni eru m.a.:**

- at kunna um Vágar og Mykines.
- at marknaðarføra Vágar og Mykines við faldarum o.ø.
- at menna og skipa fyri tiltøkum/túrum til ferðamannin.
- at menna og samskipa handils- og tænastuvinnuna í økinum.
- at kunna um og samskipa tiltøk innan mentan í økinum.

**Kunningarleiðarin skal helst:**

- kunna arbeiða sjálvstøðugur og hava góð samstarvsevni
- hava hollan málkunnleika
- hava teldukunnleika á brúkarastøði
- royndir innan ferðavinnu er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen, nevndarformann á tlf. 21 81 15.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 1. desember.

**Kunningarstovan**
Postboks 13
370 Miðvágur





